## Honda "succes"



Honda bilverksmiðjan, ið er ein av best riknu fyritøkum í Japan, klárar seg avbera væl. Roknskapartølini vísa sera góð úrslit, og teir eru komnir á marknaðin við hópin av nýggjum modellum. Honda Accord hava í fleiri ár verið millum mest seldu bilum í USA

*Kelda: Motor Magasinet*

## Ford Fusion



Seinni í ár kemur Ford Fusion á marknaðin, bilurin er bygdur yvir plattformin á nýggja Fiesta. Fusion, ið er høgur og rúmligur, kemur við 1,4 og 1,6 litur bensinmotorum og 1,4 DCi dieselmotori

*Kelda: Bil Magasinet*

## 7 pers. Peugeot



Peugeot 307 SW, ið er ein sjey persóna bilur, kemur á danska marknaðin í mai mánað. Bilurin hevur tvey setur á aftastu rekkju, ið kunnu takast úr, um brúk er fyri fimm sitiplássum og nógvum viðføri.

*Kelda: Bil Magasinet*

ÚT AT KOYRA

# Fløskuhálsar í ferðsluni



**Nú ferðslan, hesi seinnu árini, er vaksin sera nógv, bæði í bygdum og óbygdum øki, vísir tað seg, at tað eru fleiri sokallaðir fløskuhálsar, ið forða fyri at ferðslan glíður so lætt sum hon annars kundi. Tað at lastbilar og bussar hava serliga ringt við at sleppa ígjøgnum hesar fløskuhálsar, ger at teir forða óneyðuga nógv í ferðsluni**

FERÐSLA
*Magnus Gunnarsson*

Marknagilsvegurin, úti við Føroya Handilsskúla, er eitt gott dømi um hvussu eitt vegastrekki eigur at síggja út. Men tá vit koma heim ímóti býnum, eftir ringvegnum, er tann fyrsti fløskuhálsurin har sum niðankoyringin til Villingardalsvegin er. Teir bilar sum visa av til vinstru, niðan á Villingardalsvegin, standa mitt á vegnum, og forða fyri at bilarnir aftanfyri sleppa framvið. Av tí at vegurin er ov smalur á hesum vegamótinum, steðgar øll ferðslan upp, meðan bilar sum skula niðan á Villingardalsvegin bíða eftir at sleppa yvir um vegin.

### Allan vegin norðureftir

Sama er galdandi á Hvítanesvegnum, har bilar sum skulu til vinstru, inn á Vegin Langa, standa mitt á vegnum og forða ferðsluni at sleppa framvið, meðan teir bíða eftir at sleppa yvirum vegin. Um vit koyra víðari norðureftir, er á sama hátt tá vit koma til vegin inn á Hjalla. Har eru týðulig bremsuspor á høvuðsvegnum av bilum sum hava bremsa hart upp, fyri ikki at renna á bilar sum standa mitt á vegnum og blinka til vinstru inn á Hjalla. Tað sama er galdandi í Kollafirði, Hósvík, Hvalvík og aðrastaðni við.

### Lætt at broyta

Teir, sum koyra hesar stóru bilar, eru av tí avgjørdu fatan, at tað átti at verið lætt at gjørt nakað við hesar fløskuhálsarnar, sum t.d. á Hvítanesvegnum, í Kollafirði, í Hósvík, Hvalvík o.sv. Um vegirnir blivu breiðkaðir á hesum vegastrekkjum, soleiðis at teir bilar sum koyra norðureftir, og skulu til vinstru, kundu trekt inn á ein bana í miðjuni á vegnum, vóru teir als ikki til hindurs fyri ferðsluna á høvuðsvegnum. Her eru bert tikin nøkur fá dømir, men sama er galdandi nógva aðrastaðni í landinum.

# Nýggjur Mercedes í hýruvognsklassanum

**Mercedes E-klassin, ið eru best kendir sum hýruvognar í Evropa, koma nú við heilt nýggjum modelli. Tað hevur kostað Mercedes 14 milliardir krónur at gera bilin, ið er ein av heimsins mest aerodynamisku bilum í sínum klassa.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Mercedes E er fyrsti bilur í sínum klassa, har onki mekaniskt samband er millum bremsupedalin og bremsuklossarnar. Hóast tað hevur kostað 14 milliónir at gera bilin, er útsjóndin ikki so nógv broytt*

Onki bleiv spart tá designarar og teknikkarar hjá Mercedes gjørdu nýggja avloysaran fyri tann sera væl umtókta E-klassan. Hóast bilurin ikki er vorðin størri, er hann tó rúmligari enn forgangarin, og viðførisrúmið er vaksið frá 500 til 540 litrar. E-klassin fæst nú við SBC (Sensonic Brake Control) bremsuskipan, har onki mekaniskt samband er millum bremsupedalin og bremsuklossarnar. Bilurin fæst í hesum útgávum og motorstøddum: E-240 við 177 hk, E-320 við 224 hk og E-500 við 306 hk, og í dieselútgávunum E-220 CDI og E-270 CDI. Seinni kemur ein 4.0 litur V8 turbodiesel við 250 hk.



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**CITROEN JUMPY COMBI 1,9TD (8 FER_ANDI)**
Árg mars.2000, Km 28.200 .
Kr. 190.000.



**CITROEN XANTIA EXCLUSIVE 3.0 V6**
Árg Jun-98, Km 62.400 .
Kr. 165.000.



**CITROEN XSARA 2.0HDI 5H**
Árg Sep-99, Km 22.000 .
Kr. 153.000.



**CITROEN XANTIA II 2.0HDI 5H**
Árg Aug-99, Km 75.000 .
Kr. 162.000.



**CITROEN XANTIA II 2.0HDI 5H STC.**
Árg sept.99, Km 100.000 .
Kr. 158.000.



**CITROEN XSARA 2.0HDI 5H STC.**
Árg juni.99, Km 83.000 .
Kr. 140.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD 5H**
Árg okt.96, Km 94.000 .
Kr. 115.000.



**MMC L300 2.5D VØRUV.**
Árg Jun-94, Km 161.000 .
Kr. 75.000.



**MMC GALANT 2,0GTI 4H**
Árg Mai.89, Km 170.000 . sýnaður 09´01. Kr. 50.000.



**MMC LANCER 1.5GLXI 5H**
Árg Mai.92, Km 145.000 .
Kr. 52.000.



**MAZDA E2200 VØRUV.**
Árg Mar-97, Km 91.500 . sýnaður í ´01. Kr. 95.000.



**VW LT31 VØRUVOGNUR**
Árg Okt.93, Km 148.000 .
Kr. 49.000.



**SEAT CORDOBA 1.9SDI STC. 5H**
Árg Aug-99, Km 35.500 .
Kr. 125.000.



**HYUNDAI ACCENT 1.3 LS 5H**
Árg feb.99, Km 65.000 .
Kr. 75.000.



**FORD ESCORT 1.8I 16V 5H**
Árg jun.97, Km 80.000 .
Kr. 70.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo



**VW PASSAT TDI**
Árg des.94, Km 176.000. Diesel.
Kr. 95.000.



**VW VENTO TURBODIESEL**
Árg feb.95, Km 119.000. Diesel.
Kr. 132.000.



**VW CARAVELLE**
Árg jan.93, Km 185.000. Diesel.
Kr. 98.000.



**FORD ESCORT CLX**
Árg jun.91, Km 121.000. Bensin.
Kr. 34.000.



**RENAULT TWINGO**
Árg nov.96, Km 52.000. Bensin.
Kr. 48.000.



**VW GOLF II**
Árg 1987, Km 199.000. Kr. 32.000.

Audi SEAT
Bilasølan v/ Øssur Johannesen
tel 315354 - www.audi-vw.net

Fótbóltur 2002
- serútgáva í litum frá Sosialinum

Aftur í ár gera vit eitt fótbóltsblað, har vit royna at leiða lesaran eitt sindur meira afturum leiktjøldini enn vanligt. Tosað verður við leikarar, venjarar og leiðarar, sum hvør í sínum lagi hava givið til kennar sínar hugsanir og ynski.

Fyritøkur og onnur, ið ynskja at lýsa í hesari serútgávu, eru vælkomin at venda sær til okkara fyri at fáa nærri upplýsingar.

Ringið til Sosialin 311820, og tosið við:
Anju Weihe
Marknaðardeildin
anja@sosialurin.fo

